# TILTØK

**Gideon**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00 er Møti við Bergur Skovgaard, pastor í Danmark. Drekkamuður verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og hugnaløta kl. 18.00 – filmurin frá vígsluni av Missiónshúsinum verður vístur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eiði**
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í dag og í kvøld í Karmel. Kl. 17.00 barnamøti við Jónu Thomsen, sunnudagsskúlaráðgeva, Strendur, kl. 19.30 Bíbliutími: Lukasar evangel. kl. 20.00 Møti við Frits Thomsen, Skála. Hannis syngur.
Í morgin, sunnudagin kl. 12.00 Lestur, kl. 15.00 Barnagudstænasta, kl. 18.30 Bíbliutími: Jóhannesar evangel. kl. 19.00 Møti við Martin Restorff Jacobsen, presti. Argja streingjakór syngur. Innsavnan til Karmel.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 15.00-17.00 Juniorarbeiði fyri børn 3.-7. fl. Vikuskiftismøti við Bergur Skovgaard, byrja leygardagin kl. 17.00 við Ungdómsleiðara-seminar, kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti, Barnamøti kl. 17.00 Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna jarðarferð. Kl. 19.00 møti við Jóhannus Mortensen og Sólbjørg. Aftaná møti hevur streingjakórið venjing í samband við missiónsvikuna, sum verður frá 26.11. til 1.12.02.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Fríggjadagin kl. 17.15 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Palla Højgaard.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30, møti við Thaborkórinum er kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 21.00.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, Lovsang- og Bønarløta kl. 17.30, kl. 18.00 Møti.
Týsdagin kl. 16.00 venja gentur frá 1. flokki og uppeftir Santa Lucia.
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti – vitjan úr Filadelfia.
Leygardagin kl. 11.00 Barnamøti 3 til 6 ár, kl. 14.00 Barnamøti 1. fl. til 3. fl., kl. 17.00 Barnamøti 4. fl. til 6 fl.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Sangmøti uppi í Samljóð.

**Soli Deo Gloria**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Eyðun Jacobsen talar.
Mánadagin kl. 20.00 Alphaskeið og bønarmøti.

**KFUM & K í Klaksvík**
Hósdagin kl. 20.00 Bíbliutími.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Regin Høgnesen – sangur: Glyvra Streingjakór. kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hós- og fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti við Bergur Skovgaard, pastur í Danmark. Drekkamuður verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20.00 hava Elisabeth og Sámal Jákup Joensen úr Frelsunarherinum møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 15.30 Barnamøti, øll børn vælkomin.
Onskvøldið kl. 20.00 Hugnaløta fyri 10 ár og eldri.

**Betania, Porkeri**
Kvinnumøti verður mánadagin kl. 20.00.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Bygdahúsið í Lopra**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Esbjerg**
Føroyskur sunnudagsskúli verður í Gjesing kirkju Ulvevej 110, sunnudagin 17. november kl. 15.00. Børn í øllum aldri eru vælkomin. Aftaná sunnudagsskúlan verður borðreitt við kaffe/te/saft og kaku.
Øll børn og vaksin eru vælkomin.
Nærri fæst at vita hjá Árant Johannessen trúb. á tlf. 75153505.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Felagið Tórshavn – spákingartúrur**
Leygardagin 16. november verður ein lættur gongutúrur gjøgnum býin: Sjómansskúlin – forsøga og rundvísing. Byrjað verður undir Pisuvarða kl. 14.30. Varaskúlastjórin Petur Hans Dahl vísir runt úti á sjómansskúlanum í Nóatúni.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Verði vilji tín, sum í himli so á jørð«*
*Mt. 6.10*

»Faðirvár« er vorðin høvuðsbøn heimskirkjunnar, og er tann bønin, ið flest menniskju duga at biðja yvirhøvur. Hetta er eisini tann bønin, ið tey flestu børnini í Føroyum, verða lærd at biðja av foreldrum sínum, frá tí at tey eru heilt smá.

Henda bønin er slitsterk og røtt at biðja, tí at sjálvur Jesus lærdi okkum, at biðja soleiðis.

Hóast at næstan øll kristin menniskju duga at biðja bønina Faðirvár, so eru tað mong menniskju, sum hava ilt við – ella aftra seg við, at biðja hana, m. a. tí, at tað er so torført at biðja fimtu bøn: »Fyrigev okkum syndir okkara, so sum vit eisini fyrigeva teimum, ið móti okkum synda«.

Er tað nakað, sum vit alt ov ofta mangla, so er tað tað fyrigevandi sinnalagið.

Vit koma so mangan út fyri, at mistaka okkum, bæði í orðum og verki, men tað tykist altíð so tungt, at viðganga okkara brek, og enn verri at fara til rætta viðkomandi og biðja um fyrigeving.

Men Guð ynskir, at vit í halgan okkara, koma at líkjast honum meiri og meiri, soleiðis at vit gerast betur og betur før fyri, at viðganga brek okkara og mistøk, og til at fara til rætta viðkomandi, fyri at biðja um fyrigeving, – tað er: til okkara medmenniskja og Guð.

Men tað er ein onnur bøn í Faðirvár, sum tykist líka so torfør at biðja, Og tað er triðja bøn:

Verði vilji tín sum í himli so á jørð!

Vit hava so lætt við at heita á Guð tá ið vit eru í neyð, – ella tá ið vandarnir lúra, og rætt er at gera tað, nógv dømir eru um persónar í Bíbliunni, sum hava gjørt tað og hava fingið hjálp frá Harranum.

Men tað er ikki altíð, at vit fingu ta hjálp, sum vit bóðu um. Mangan hildu vit kanska tvørtur ímóti, – at Guð slett ikki svaraði bønum okkara, – at vit ikki fingu nakað av tí, sum vit bóðu um.

Og tað kann eisini vera rætt, – at vit ikki fingu tað soleiðis, sum vit bóðu um, at fáa tað.

Tí at Guð, sum skapað hevur himmal og jørð bert við einum orði, – hann veit, hvat okkum er tørvur á, langt áðrenn vit biðja hann, og Jesus sigur, at hann veit, at geva børnum sínum góðar gávur, teimum sum biðja hann.

Eitt vita vit út frá Guds orði, at tað, sum Guð mest av øllum ynskir at geva okkum, er eitt lívssamfelag við seg. Eitt lívssamfelag, hvar Guð við sínum vísdómi og ráðum, sleppur at leiða okkum trykt fram í móti málinum, sum er Himmalin.

Tann, sum hevur tikið ímóti Guði við trúgv á Jesus Kristus, hevur fingið eina vón fyri framman, bæði her í lívinum og í tí komandi.

Tað menniskja, sum livir í trúnni á syndanna fyrigeving, og livir av øllum tí, sum Guð eigur at geva, -tað kann trykt leggja lív sítt í Guðs hendur og biðja bønina:

Verði vilji tín, sum í himli so á jørð!

Amen!

**Sverri Steinhólm**

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 16. nov.: Runavík, tlf. 44 80 16
Sunnudagin 17. nov.: Runavík, tlf. 44 80 16

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 13.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Tóra Højgaard, Toftir og Hans Toftegaard, Fuglafjørður. Brúdleypsadr.: Bygdarhúsið í Leirvík.

Í dag, leygardagin kl. 16.00 vígast í Kunoyar kirkju Magna Dania Danielsen, Kunoy og Sørin Ragnar Joensen, Toftir. Brúdleypsadr.: Undir Brúnni 4, Klaksvík. Brúðarhús er sunnudagin 17. nov. Undir Brúnni 4, Klaksvík.

Í dag, leygardagin kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Tóna í Niðristovu, Vestmanna og Ernst Olsen, Tórshavn. Veitslan verður hildin í HB-húsinum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 23. november kl. 13.00 giftast í Gideon Vestmanna, Alice Simonsen, Sørvágur og Finnbjørn Garðalíð, Vestmanna. Borðhaldið verður fyri innbodnum á Hotel Vágum, kl. 17.00. Kl. 21.00 verður opið hús í heiminum í Sørvági, har øll eru hjartaliga vælkomin. Møguligt verður hjá avbygdafólki at sleppa heimaftur.

14. desember kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Noomi Sørensen, Norðragøta og Petur Reinert, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, kunnu tekna seg á tlf. 441363 ella 443215 í seinasta lagi 8. desember 2002.

Leygardagin 4. januar kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreta Dam, Argir og Brynjer Gregoriussen, Tórshavn. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 21 30 65 ella 31 30 54 innan 20. desember.

## SILVURBRÚDLEYP

3. desember kunnu hjúnini Ásbjørg og Heini Reinert, Leirvík, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður heima 30. november 2002 frá kl. 19.00.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 30.11.2002 hava Sanna og Henning Mortensen, Argjavegur 40 á Argjum, verið gift í 50 ár. Opið hús verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

## 95 ÁR

Sunnudagin 17. nov. verður Karin Strøm í Trongisvági 95 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum, Ólavur frá kl. 14.00 til 18.00.

## 75 ÁR

Mánadagin 18. november verður Salli Lognberg í Skopun, 75 ár. Hann er burturstaddur.



# TILTØK

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 18. nov.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 **Ítriv vit hugsa um jólini**
**Alla vikuna verður framsýning í kjallaranum av nálatøvdum lutum.**
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 19. nov.:*
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 **Vælgerðarmerkir.** Suni Vinther og Álvur Danielsen. **Vitjan frá Føroya Fólkaháskúla.**
*Mikudagin 20. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 21. nov.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17.00 **Virka til jóla**.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 22. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.




